# Nú glottar eru verður Napoleon

**– Eg haldi, tað er fyri neyðini, at aðrir "aktørar" eru komnir inn á føroyska fíggjarmarknaðin. Hetta er ein avgjørd treyt, um føroyskum vinnulívi skal verða lív lagað, nú teir størstu føroysku peningastovnarnir brúka sína tíð upp á at berjast um at fíggja sethúsalán við lágari rentu, sigur Tórbjørn Jacobsen, reiðari, sum harmast um, at Napoleon ikki fær ein møguleika aftrat, nú útlitini hóast alt eru betri**

RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rækjuskipið Napoleon, sum løgtingsmaðurin, Tórbjørn Jacobsen er reiðari á, er lýst at fara á tvingsilssølu um nakrar vikur. Tað er Føroya Sparikassi, sum eigur 1. veðrætt í skipinum, ið hevur biðið um tvingsilssøluna.

## Lagdur í september

Tórbjørn Jacobsen sigur, at Napoleon bleiv lagdur í september í fjør eftir, at tað bara hevði gingið niður á bakka, og peningur fossaði út úr kassanum, sum hann tekur til.

– Rækjuprísirnir høvdu gingið niðureftir í eini fýra ár, og oljuprísirnir vóru uppi ígjøgnum.

Hann sigur, at tá ið teir keyptu skipið á heysti 2002, hevði rækjumarknaðurin leingi ligið í andaleypi.

– Øll væntaðu, tá ið vit keyptu skipið, at prísirnir høvdu nátt botninum – ella tí avgjørda nullpunktinum, og eingin væntaði, at prísirnir kundu lækka uppaftur meira. Útrokningar, sum vit høvdu, søgdu, at hækkaði rækjuprísurin við í miðal eini 50 oyrum fyri kilo, fór verkætlanin væl og virðiliga at hanga saman.

Men, staðfestir Tórbjørn:

– Vit fingu annað at síggja; rækjuprísirnir lækkaðu uppaftur meira, samstundis sum oljuprísirnir hækkaðu. Tí sóu vit í september, at eingin logikkur var í at halda fram, soleiðis sum støðan var, og vit høvdu heldur ikki likviditet at reka skipið undir táverandi umstøðum.

## Aðrir "aktørar"

Reiðarin sigur, at síðan er tað hent, at Føroya Sparikassi, sum er einasti kreditorur, umframt sjópantini, krevur, at skipið nú verður selt á tvingsilssølu.

– Føroya Sparikassi hevur ikki strekt seg til nakað sum helst, og eg vil siga, at millum partarnar hevur at kalla eingin dialogur verið.

Tað skilst á Tórbirni, at hann avgjørt ikki er nøgdur við viðurskiftini millum reiðaríið og peningastovnin.

– Eg haldi, tað er fyri neyðini, at aðrir "aktørar" eru komnir inn á føroyska fíggjarmarknaðin. Hetta er ein avgjørd treyt, um føroyskum vinnulívi skal verða lív lagað, nú teir størstu føroysku peningastovnarnir brúka sína tíð upp á at berjast um at fíggja sethúsalán við lágari rentu.

Hann heldur, at føroysku peningastovnarnir í løtuni liva upp á neyðina hjá sethúsaeigarum við lágari rentu og langari afturgjaldstíð - og við 100% trygd í pantinum.

– Hetta er fyri peningastovnarnar ivaleyst líka so trygt sum at seta peningin í danskar statsobligatiónir, sigur Tórbjørn.

## Betri útlit

Tað harmar reiðaran, at skipið verður kravt á tvingsilssølu, nú útlitini í rækjuvinnuni hóast alt eru bjartari, enn tey hava verið leingi.

– Oljuprísirnir eru lækkaðir nakað aftur, og rækjuprísirnir eru hækkaðir munandi.

Tórbjørn vísir á, at í onkrum sorteringum av rækjum eru prísirnir hækkaðir 60 % seinastu mánaðirnar.

– Nú færri rækjuskip eru í flotanum, eru eisini møguleikarnir munandi betri.

Hann sigur, at tey rættindi, sum Føroyar hava í rækjukvotum og rækjudøgum, bera ikki fleiri enn trý skip, um raksturin skal vera lønandi, soleiðis sum støðan er.

– Um kvoturnar undir Eysturgrønlandi og á Grand Bank verða býttar yvir trý skip saman við teimum rættindum, vit hava á Flemmish Kap og við Svalbard, er lítil ivi um, at raksturin hjá rækjuskipunum hevði sæð betur út, sigur reiðarin, Tórbjørn Jacobsen.






*– Føroya Sparikassi, sum hevur 1. veðrætt í Napoleon, hevur ikki strekt seg til nakað sum helst, og eg vil siga, at millum partarnar hevur at kalla eingin dialogur verið, sigur reiðarin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# – Vit hava ikki givið skarvin yvir

**– Vit royna ymiskar ítøkiligar møguleikar, og eg kann siga, at vit hava ikki givið skarvin yvir, sigur Tórbjørn Jacobsen, reiðari**

RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú rækjuskipið Napoleon er lýst at fara á tvingsilssølu um nakrar vikur, sigur reiðarin, Tórbjørn Jacobsen, at teir als ikki hava givið skarvin yvir.

– Vit hava einar sjey vikur at loysa málið í, og eg vóni, at vit hava eina loysn, áðrenn skipið verður selt.

## Ymiskir møguleikar

Tórbjørn Jacobsen sigur, at felagið nú kannar ymiskar møguleikar, bæði føroyskar og útlendskar, og hann endurtekur úr fyrru greinini á hesi opnuni, hvussu týdningarmikið tað er fyri føroyskt vinnulív, at aðrir útbjóðarar eisini eru innan føroyska vinnulívsfígging.